# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Fimm ára kríggj

Tann 20. mars í ár vóru fimm ár liðin, síðan nøkur lond við USA á odda lupu á Irak við miklari hermegi og gjørdu innrás í landið. USA segði orsøkirnar til álopið at vera tríggjar: at Irak hevði hópoyðingarvápn, at Irak stuðlaði al Qaida yvirgangsfelagsskapinum og at bjarga Irak undan einum ódemokratiskum harðræði, ið framdi fólkamorð á eitt nú kurdiska minnilutan í landinum. Fleiri lond, eitt nú Bretland og Danmark, tóku undir við innrásini og sendu herfólk í bardagan ikki minst orsakað av páhaldinum um hópoyðingarvápnini.

ST tók ikki undir við innrásini og lýsti hana ólógliga. Longu tann 2. mai í 2003 lýsti George W. Busch bardagarnar at enda komnar og sigursrómurin var øgiligur. Síðan henda dag hevur tó lítil friður verið í hesum hart plágaða landi. Orsøkirnar til ófriðin er mangar, men hetta, at tað er gamalt agg millum Sunni muslimar og Shia muslimar ger tað sera trupult at sameina landið og skapa varandi frið. Átrúnaðarligir spurningar hava sum heild nógv størri týdning, enn hersetingarvøldini høvdu roknað við. Tá innrásin varð framd roknaðu Busch og Blair við, at fagnaðurin um, at diktaturið nú var burtur fór at slætta vegin fyri eini vesturlendskt sinnaðari fólkaræðiligari skipan. Men soleiðis gekk tað sum kunnugt ikki - til tess vóru mentanarligu, átrúnaðarligu og sosialu spenningarnir alt ov stórir og gomul ættarbond og etniskir trupulleikar forðaðu fyri teimum mest einføldu demokratisku mannagongdum. Fyri at fáa fyrisiting og løgreglu at virka hevur verið neyðugt at taka starvsfólkið hjá gamla Baatstýrinum, sum varð koyrt til hús, tá Saddam fall, inn aftur í hitan. Hvat er so vunnið? spyrja mong.

Kríggið í Irak er vorðið ein støðugt vaksandi politiskur, hernaðarligur og moralskur trupulleiki hjá teimum londum, sum virkin taka lut í hersetingini av Irak. Irakar eru flýddir í milliónatali av landinum eins og innanlanda flytingin er stór og elvir til trupulleikar og ófrið. Hvussu nógv irakisk mannalív, kríggið hevur kostað, er óvist, men talan kann vera um fleiri hundrað túsund. Hinvegin vita vit, at á fimm ára degnum var talið á falnum ameriskum herfólki júst komið upp á 4000. Eitt gamalt orð sigur, at tað er lætt at byrja eitt kríggj, men trupult at enda kríggið. Hesi orð hava serstakliga USA og Bretland sannað. Umframt missin av mannalívum er Irakkríggið við at gerast ein búskaparlig vanlukka fyri USA. Tað er lítið, sum bendir á, at kríggið kann vinnast við hermegi. Her má ein politisk loysn halda flestu óheftu eygleiðarar, men so leingi Bush er við valdið, bendir einki á eina politiska loysn í bræði.

**Sosialurin**

# Veðurlagsráðstevna – a wake-up call



SJÓNARMIÐ
*Helena Dam á Neystabø*
*Landsstýriskvinna í umhvørvismálum*

Hvønn leiklut kunnu Føroyar fáa, nú veðurlagsbroytingar standa ovast á dagsskránni víða hvar í altjóða orðaskiftinum?

Er tað eitt ”wake-up call” til politiska myndugleikan, til vinnulívið og til hvønn einstakan føroying, at ein veðurlagsráðstevna við so mætum røðara sum Al Gore fer av bakkastokki um smáar fjúrtan dagar í Havn?

Eg vóni tað! Og eg fegnist um, at tað júst er vinnan sjálv, sum hevur tikið stig til hesa ráðstevnu. Tí - hóast hagtølini um tað føroyska $CO_2$ útlátið ikki eru dagførd, so kenna vit á leið hvussu stórt $CO_2$ útlátið er. Vit vita eisini, at uml. 60 % av okkara $CO_2$ útláti stavar frá fiskivinnu, elframleiðslu og frá vinnuni annars, og at uml. 14 % stava frá húsarhaldunum. Skulu vit skerja okkara $CO_2$ útlát, soleiðis sum Veðurlagssáttmálanum mælir til, sambært Kyoto protokollini og sum avleiðing av veðurlagsráðstevnuni í 2009 í Keypmannahavn – ja so verður neyðugt at skerja innan øll samfelagsøki, og ikki minst, har tað ger stórstan mun.

Tað er bráðneyðugt, at politiski myndugleikin tekur seg saman og ásannar, at hann hevur eina stóra ábyrgd, ikki bert at orða men eisini at fremja ein framsóknan umhvørvispolitikk.

### Ein íløga í umhvørvið lønar seg

Tað er ein stór avbjóðing at skerja okkara útlát av veðurlagsgassum so nógv, sum væntað verður av okkum. Og tað kemur at kosta. Størsta takið er óivað at síggja avbjóðingina sum ein møguleika at menna nýggjar vinnur, og eitt gylt høvi at gera júst tær broytingar og tær íløgur, sum eru neyðugar til tess at tryggja bæði kappingarførleika og altjóðagerð frameftir.

Tað er longu byrjað, og rákið stendst ikki til at venda. Brúkarin bæði úti og heima fer at krevja dokumentatión og trygd fyri, at tann matvøra, sum hon ella hann skal borðreiða við, er fiskaður og framleiddur á ein umhvørvisvinarligan og burðardyggan hátt. Tað er ikki longur nóg gott at siga, at havið kring Føroyar telist millum heimsins reinastu høv. Skulu vit vera kappingarfør, verða vit noydd til at prógva, at vit fara væl við umhvørvinum í allar mátar.

Eg ivist tí onga løtu í, at ein íløga í umhvørvið kemur fleirfalt aftur. Men vit koma ikki at síggja vinningin beinan vegin.

Og tó! Eydnast tað at gera Føroyar til ein miðdepil fyri veðurlagsgransking – serliga við atliti til havumhvørvi, so ivist eg ikki í, at skjótt fara síggja úrslit.

### Mitt í sjónum

Vit vita at $CO_2$ innihaldið í atmosferuni er vaksið heilt nógv seinastu tveyhundrað árini. Flestu granskarar eru á einum máli um, at hesin vøkstur er mannaelvdur, og at størsta einstaka dálkingarkeldan er tann nógva brenningin av olju, koli og gassi, sum elva til vakstrarhúsárin.

Vit vita eisini, at havið hevur stóran týdning, millum annað tí at havið upptekur ein stóran part av tí koltvísúrni, sum vit menniskju lata út í lofthavið.

Føroyskir granskarar hava hegnisliga víst á, hvussu stóran týdning havið og havstreymar hava í øllum vistskipanum, og hvussu havið verður ávirkað av veðurlagsdálkingini, og fyri kortum fekk Bogi Hansen norðurlendska virðisløn fyri sína slóðbrótandi gransking um havið.

Einki er at ivast í, at Føroyar, sum liggja mitt í sjónum, kunnu gerast ein miðdepil í strembanini eftir at fáa svarað fleiri av ósvaraðu spurningunum um havið og um veðurlagsbroytingar, eins og vit kunnu taka lut í royndunum at menna tøkni og vitan, ið kann venda gongdini. Skal tað eydnast, er neyðugt at allir partar samstarva og seta sær felags mál.

Sum landsstýriskvinna í umhvørvismálum vil eg taka við kelvinum, sum Bitland og Vinnuhúsið setur í umfar á Veðurlagsráðstevnuni tann 7. og 8. apríl í Havn, og bera tað víðari, soleiðis at Føroyar gera sítt til at tálma veðurlagsbroytingunum, ið kunnu fáa oyðileggjandi avleiðingar, um vit geva upp.

Uppgávan hjá mær er, sum skjótast, at fáa til vega neyðuga vitan, dagførd hagtøl og eina beinrakna støðumynd, og síðani at orða eina heilt ítøkiliga virkisætlan. Eina virkisætlan, sum ikki bert Løgmála- og umhvørvisráðið fær ábyrgdina av at fremja í verki, men sum vit øll mugu fremja í felag.

## Rætting til grein um kjakmentan í kreppu

*Hans Andrias Sølvará*

Í viðmerking mínari til Símun Absalonsen í Sosialinum í gjár havi eg lagt merki til ein feil. Eg skrivi í viðmerkingini, at Símun Absalonsen setur mín tekst upp ímóti trúarjáttanini, sum er skrivað í 300-árunum e.Kr. Her sipi eg til Nikeansku trúarjáttinina, men Símun Absalonsen vísur í síni grein til Ápostólsku trúarjáttanina frá um 200 e.Kr.

Eg biði lesaran og serstakliga Símun Absalonsen um umbering fyri mistakið.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.